## Avloysari fyri skúlavørðin á Skúlanum á Ziskatrøð

Í sambandi við farloyvi søkir Skúlin á Ziskatrøð við hesum eftir avloysara fyri skúlavørðin at byrja 4. august 2003 og til 29. februar 2004.

**Arbeiðsøkið** fevnir um bygningarnar og økið, sum hoyrir til Skúlan á Ziskatrøð.

**Arbeiðsuppgávurnar.**
Við tilvísing til leiðslu skúlans fevnir starvið m.a. um dagligt eftirlit, reinhald og viðlíkahald av bygningum, innbúgvi, amboðum, skúlagarði og uttanumøki annars.

Skúlavørðurin hevur somuleiðis dagliga umsjón og eftirlit við reingerðingini av skúlanum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava handverkaraútbúgving ella aðra útbúgving og starvsroyndir á økinum, skal duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni.

**Lønar- og setanartreytir** eru sambært sáttmálan við Starvsmannafelagið, lønarflokkur 3.

Í sambandi við møguligar bygnaðarbroytingar verður skúlavørðurin at tola broytingar í arbeidsøki og setanartreytum.

**Fleiri upplýsingar** kunnu fáast við at venda sær til Ásbjørn Lómaklett skúlastjóra, tlf. 21 55 57 ella 45 67 49.

**Umsóknir** saman við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða:

**Skúlanum á Ziskatrøð**
**Postboks 53**
**FO-700 Klaksvík**

í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 25. juli 2003.

**Klaksvíkar Býráð**

Landsfelag Pensjónistanna

## Ferðatilboð

Landsfelagið boðar frá, at Pensjónistafelagið H.Ø.F.T. ger útferð til Noregs tann 25. august.

Av frámelding vegna sjúku eru 4 pláss leys.

Fólk, ið hava áhuga, biðjast um at ringja til Thorbjørn Lisberg, formann, telefon 371150.

**Landsfelag Pensjónistanna**

## Summarfrí

Verkstaðið er stongt frá 21. juli til 18. august 2003

**Einar Mikkelsen Sp/f**
El-innleggjaravirkið
Tórshavn


**málingin til húsini fæst í**
**máling & gólv**

Samstundis sum vit selja við stórum avsláttri av okkara málingagoymslu verður latið 10% í avsláttri av máling ið ikki er á útsølu - tilboðið er fyri innflutta máling

Til dømis:
STORMSHIELD
BETONMÁLING 10L fyrr 549,-
-10%: nú 494,-

TRÆVERJA 5L fyrr 399,-
-10% nú 359,-

SLITSTERK VEGGJAMÁLING
SILKIGLØTT 10L fyrr 499,-
nú 449,-

SLITSTERK MATT
VEGGJAMÁLING
10L fyrr 299,-
-10% nú 269,-

**Vit selja í løtuni RESTGOYMSLU MÁLING, TAPET OG FLISAR**

**Til dømis: MÁLING úr bert 10,- kr liturin**

**TAPET avsláttur úr 75%**

**FLISAR** stórur avsláttur
**til dømis: 7 kvadratmetur gólv flisar einans 250,- kr í alt**

Sosialurin 341800

**Tel 316066** **máling & gólv**


## TOEFL-roynd 18. oktober 2003

**(Test of English as a Foreign Language)**

Møguleiki er nú at taka sonevndu "paperbased" TOEFL-royndina í Føroyum.
TOEFL-royndin er ofta upptøkukrav á hægri lærustovnum í ensktmæltum londum.

Royndin verður 18. oktober 2003 á Fróðskaparsetri Føroya, tilmeldingarfreistin er 29. august í USA!

Neyðugt er at melda seg til sum skjótast.

Tilmeldingarblað og Information Bulletin 2003/2004 fyri pappírsroyndina fáast á

www. ASK .fo

| **Altjóða Skrivstovuni** | **Fróðskaparsetri Føroya Setursskrivstovuni** |
| --- | --- |
| tlf. 322065 | tlf. 352500 |
| ask@ask.fo | setur@setur.fo |
| www.ask.fo | www.setur.fo |

Kostnaðurin er 130 USD. Tilmelding saman við gjaldi er beinleiðis til:

**TOEFL Registration Office**
P.O. Box 6152
Princeton NJ 08541-6152
USA
www.toefl.org

Næsta TOEFL-roynd verður fríggjadagin 12. mars 2004, tilmeldingarfreistin til ta royndina er 26. januar 2004.

## Tvingsilssøla

Fríggjadagin, tann 15. august 2003, kl. 9.45 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir ognina matr. nr. 1464c, íbúð nr. 23, Tórshavn, liggjandi á bústaðnum Berjabrekka 133, 100 Tórshavn (AS nr. 2-7/2003).

Sambært tryggingarskjalinum er talan um eina íbúð í einari hædd og er tað bygda økið 46 kvm.

Í íbúðini er 1 køkur og stova í einum, 1 sovikamar, 1 gongd og 1 toilett v/ brúsu. Uttan fyri er hjallur og urtagarður.

Tvingsilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 4506201), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 17/07-03*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2331, Sp/f Pure Water, 700 Klaksvík
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Pauli Poulsen, 350 Vestmanna (formaður) og Jógvan Ziska Djurhuus, Peder Andersensvej 1, DK-9850 Hirtshals
**Innkomin í nevndina:** Óli Marner Christiansen (formaður) og Eyðun Kjølbro, Stangavegur 56, 700 Klaksvík.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Eyðbjørn Poulsen, Kommunubrekka 7, 700 Klaksvík.
**Innkomin sum stjóri:** Hanus Hansen, Undir Brúnni 22, 700 Klaksvík.
**Grannskoðari:**
Farin frá sum grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið Inpact, statsaut. revisorar, R.C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
**Innkomin sum grannskoðari:** P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 17. juli 2003*

*Kristin Balle*


www.haraship.dk

HARASHIP
Den Maritime Jobformidling

Sjómenn · Fiskimenn · Reiðarí
Vilja tit hava hýru uttanlands
ella kunnu tit bjóða hýru

Hygg so her!

Vit átaka okkum at veita tænastur
um alla Skandinaviu:
· Hýra fiski- og sjómenn · Offshore · Skeið
· Útbúgvingar · Ferðaseðlar · Gistingarhús - Hotell

Allir upplýsningar eru loyniligir!
Tygum fáa nærri at vita á: 0045 60603483
info@haraship.dk · www.haraship.dk



**Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð**
Nú eisini úr Føroyskum gróti

Skjót levering

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Sosialurin - 311820

Danstein Tel. 447512 Tel. 217512 Tel. 318323 Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN




FK Dr. Jakobsensgøta sóknast eftir

## handilslærlingi

at byrja 1. september 2003.

**Krøv/útbúgving:**
FHS: 3 ára lærutíð
HH: 2 ára lærutíð
Student/HF: 2 ár og 18 vikur

Vit bjóða einum røskum fólki – drongi ella gentu – við dirvi og áræði, eina útbúgving undir skipaðum viðurskiftum í einum handli, har lív er í.

Arbeiðstíð: 40 tímar um vikuna, frí annan hvønn leygardag.

Nakrar ferðir í lærutíðini verður farið á skeið í Danmark.

**Okkara krøv:**
Fyrikomandi, kundavinarligur, røkin, góð samstarvsevnir.

**Løn:**
Sbr. S&K sáttmálanum.

**Umsókn:**
Skrivlig, saman við próvtøkuskjali. Skal sendast í seinasta lagi 16. aug. 2003, merkt. *Lærlingur.*

Aðrir upplýsingar fáast við at ringja tlf. 311320 ella 217593, Bo Møller.

**Keypssamtøkan**
í Dr. Jakobsensgøtu
Boks 349
FO-110 Tórshavn

## Kappríðing á Ólavsøku



Tilmelding til kappríðingina í Marknagili ólavsøkudag kl. 14.00 er á telefon 314500, 421643 ella 219098 til fríggjadagin 25. juli kl. 19.00.

Ríðararnir skulu nýta hjálm.

**Føroya Ríðingarfelag**

## Skúlavørður til Skúlan við Ósánna

Skúlin við Ósánna søkir við hesum eftir skúlavørði at byrja hálvan august, tá nýggja skúlaárið byrjar.

**Arbeiðsøkið** fevnir um bygningarnar og økið, sum hoyrir til Skúlan við Ósánna.

Í løtuni er í høvuðsheitum talan um Skúlan við Ósánna, Fimleikarhallirnar, Skúlan í Árnafirði og Gamla Skúla.

**Arbeiðsuppgávurnar**
Við tilvísing til leiðslu skúlans fevnir starvið m.a. um dagligt eftirlit, reinhald og viðlíkahald av bygningum, innbúgvi, amboðum, skúlagarði og uttanumøki annars.

Skúlavørðurin hevur somuleiðis dagliga umsjón og eftirlit við reingerðingini av skúlanum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava handverkaraútbúgving ella aðra útbúgving og starvsroyndir á økinum, skal duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni.

**Lønar- og setanartreytir** eru sambært sáttmálan við Starvsmannafelagið, lønarflokkur 3.

Í sambandi við møguligar bygnaðarbroytingar verður skúlavørðurin at tola broytingar í arbeiðsøki og setanartreytum.

**Fleiri upplýsingar** kunnu fáast við at venda sær til Símun P. Hjelm skúlastjóra, tlf. 45 60 73 ella 21 83 73.

**Umsóknir** saman við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða:

**Skúlanum við Ósánna**
Postboks 260
FO-700 Klaksvík

í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 1. august 2003.

**Klaksvíkar Býráð**

## Hjálparfólk á ólavsøku

Pylsuvognurin á Vaglinum søkir eftir fólki at arbeiða á ólavsøku.

Áhugað kunnu ringja á
tlf. 318061 (millum kl. 12.00 og 14.00), ella
tlf. 311874 (eftir kl. 16.00).

**ALV pylsuvognurin á Vaglinum**

## Summarfrí

Stongt verður frá 28. juli til 25. august.

**Matrikulstovan**

## Almenn skeið á Fróðskaparsetri Føroya 2003-2004

***1) Próvskeið í føroyskum***

Endamálið við skeiðinum er, at menna hegnið at nýta málið sum amboð á ein góðan og fjøltáttaðan hátt og at økja fatanina av føroyskum máli og nýta tað í arbeiði, gerandislívi og til hægri lestur.
Skeiðið byrjar á *Føroyamálsdeildini 22.* september í einum flokki við undirvísing mánadag og mikudag, báðar dagar kl. 16.15-18.30.
-Fortreytir: Føroyskt á miðnámsskúlastigi ella samsvarandi.

Lærari: Lena Reinert

***2) Próvskeið í enskum***

a) Skeið til Cambridge Certificate in Advanced English byrjar á *Setursskrivstovuni* 2. oktober í einum flokki við undirvísing hósdag kl. 13.00-16.00.
-Fortreytir: Miðnámsstigi A/B ella samsvarandi kunnleiki, eitt nú Cambridge FCE-royndin, førleiki í at nýta málið, talað og skrivað.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

b) Skeið til Cambridge Certificate of Proficiency in English byrjar á *Føroya Landsbókasavni* 1. oktober í einum flokki við undirvísing mikudag kl. 9.00-12.00.
- Fortreytir: Staðið "Advanced English", málsligt students-, HF-, HH-prógv ella samsvarandi, góðan førleika at nýta málið.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

Próvtøkurnar verða í mai/juni 2004.

Nágreiniligari upplýsingar og tilmeldingarbløð eru at fáa á setursskrivstovuni. Tilmelding-arfreistin er sett til **29. august 2003**. Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, sohvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.
**Tilmeldingargjaldið er 650 kr.**
Fyri próvtøku í føroyskum gjalda næmingar 500 kr.
Fyri próvtøku í Advanced gjalda næmingar 800 kr. og fyri próvtøku í Proficiency 900 kr.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn
www.setur.fo

SKOGRØKT LANDSINS
Gróðurstøðin verður stongd í viku 31 og 32.